# Klaksvíkar Býráð

**Dagfesting:** 29.09.2022 kl. 16:30
**Málnr.:** 21/01365 Gerðabók
Nevndarlimir: Karl Johansen, Atli S. Justinussen, Jógvan Skorheim, Símun á Høvdanum, Oddmar á Lakjuni, Jóhanna Christiansen, Eyðstein Ó. Poulsen, Annika S. Biskopstø, Óli M. Lassen, Signhild V. Johannesen og Tummas J. Lervig
Varalimir: Rógvi Jacobsen møtti fyri Anniku S. Biskopstø í máli 87/22
Ikki møtt:
Onnur: Rúni Rasmussen, kommunustjóri
Protokollførari: Jensa Anthoniussen, fulltrúi

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| **Til viðgerðar** | | |
| 67/22 | 22/01493-5 | Býráðslimi berst frá at røkja býráðsarbeiðið í meira enn samfullar 14 dagar (Gunvá við Keldu) |
| 68/22 | 22/01259-4 | Innstilling til val av limum í Føroyagrunnin frá 1971 |
| 69/22 | 22/01247-3 | Viðtøkubroytingar og val av nevndarlimi í grunnin Íverksetarahúsið - góðkenning |
| 70/22 | 22/01408-19 | Fíggjarætlan Klaksvíkar Sløkkiliðs fyri 2023 til góðkenningar |
| 71/22 | 21/01969-1 | Reglugerð fyri víðarisølu av kommunalum grundstykkjum |
| 72/22 | 21/01604-2 | Broyting av byggisamtykt fyri D1, D36 og C19, Norðoyri |
| 73/22 | 22/00353-10 | Umsókn um umbygging av neysti á Flesjum, matr.nr. 916 |
| 74/22 | 22/01416-6 | Umsókn um umbygging av seyðahúsi - matr.nr. 59b, Árnafjørður |
| 75/22 | 22/01445-6 | Umsókn um loyvi at bora eftir jarðhita í fjøruni - Matr.nr. 1366a, Klaksvík. |
| 76/22 | 22/00816-5 | Umsókn um uppíbygging til goymslubingjur og reinsitanga - Matr.nr. 163ad, Klaksvík (POMEK) |
| 77/22 | 22/00894-3 | Umsókn um byggiloyvi til altan og hjall - Matr.nr. 746p, Klaksvík |
| 78/22 | 22/01011-5 | Umsókn um byggiloyvi til bilhús - Matr.nr. 1252, Klaksvík |
| 79/22 | 22/01214-7 | Umsókn um at taka bygning niður á Lávíkarbrekku 3 & 5 |
| 80/22 | 21/01334-18 | Stangavegurin - marknaumskipan millum matr.nr. 1158 og 1160 |
| 81/22 | 22/01236-1 | Marknaumskipan ísv. útbygging á matr.nr. 54b í Ánunum |
| 82/22 | 22/01458-2 | Umsókn um marknaumskipan við Borðoyarvík - matr.nr. 875 v.fl |
| 83/22 | 21/01339-9 | Nýggj høvuðsvatnleiðing í samband við tunlarnar norður um fjall |

| | | |
|---|---|---|
| 84/22 | 21/02151-41 | Vegir, Íløgur, 2022: avseting til Gøtuljós íløgur og Vatnveiting íløgur - *flyting millum kontur, seinna viðgerð* |
| 85/22 | 22/01123-1 | Hitavekslari til svimjihøllina - *flyting millum kontur, seinna viðgerð* |
| 86/22 | 22/01408-21 | Fíggjarætlan 2023, Klaksvíkar Býráð - fíggjarkarmur 2023 |
| **Til viðgerðar fyri afturlatnum hurðum** | | |
| 87/22 | 22/01688-1 | Vinnu- og mentanarstjóri |
| 88/22 | 22/01425-1 | Lendiskeyp til Fifa-vøll á Syðradali |
| 89/22 | 22/01480-4 | Møguligt keyp av lendi til parkeringsøki |
| 90/22 | 22/00083-11 | Søla av lendi |
| 91/22 | 22/01473-3 | Víðarisøla av lendi |
| 92/22 | 22/01126-11 | Innlating/víðarisøla av lendi |
| 93/22 | 22/01370-15 | Víðarisøla av lendi |

*Av praktiskum orsøkum vórðu málini fyri afturlatnum hurðum avgreidd fyrst á fundinum (kl. 16:30) – síðani vórðu málini á opna fundinum avgreidd frá kl. 17:30*

**Til viðgerðar**

## 67/22
## 22/01493-5 Býráðslimi berst frá at røkja býráðsarbeiðið í meira enn samfullar 14 dagar (Gunvá við Keldu)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Klaksvíkar Býráð | 29.09.2022 | 67/22 |

**Frágreiðing um málið:**
Gunvá við Keldu, býráðslimur vald fyri Fólkaflokkin, hevur boðað frá, at henni berst frá at røkja býráðsarbeiðið frá 1. september til 30. november 2022. Næstvaldur á vallistanum er Símun á Høvdanum.

Borgarstjórin hevur - vísandi til § 6, 2. reglubrot í *Reglugerð fyri innkalling av varalimum* - skipað fyri, at Símun á Høvdanum tók sæti fyri Gunvá við Keldu í teimum nevndum, hon hevur sæti í, í júst farna nevndarumfari.

Vísandi til somu § 6, 2. reglubrot í omanfyri nevndu reglugerð, verður farloyvisumbønin frá Gunvá við Keldu nú løgd fyri býráðið til samtyktar og staðfestingar.

**Lógargrundarlag:**
- Kommunustýrislógin, § 18, stk. 2 og stk. 3:

*Stk. 2. Berst kommunustýrislimi væntandi frá at røkja starv sítt í meira enn 14 samfullar dagar vegna annað alment starv, heilsustøðu ella aðra lógliga orsøk, skal viðkomandi boða borgarstjóranum frá, og borgarstjórin skal síðani geva tiltakslimi fundarboð.*
*Stk. 3. Kommunustýrið ger av, um treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi eru loknar.*

- Reglugerð fyri innkalling av varalimum í býráðið og føstu nevndir býráðsins, samtykt av býráðnum 22.03.2011, § 6:

  *Um býráðslimur fær forfall ella søkir um farloyvi í eitt tíðarskeið, sum er longri enn 2 mánaðar, tekur næsti persónur á viðkomandi vallista sæti bæði í býráðnum og sum limur/varalimur í teimum* [býráðs]*nevndum, har býráðslimurin, sum fer í farloyvi, er limur/varalimur.*

  *Eru ongar orsøkir til iva um heimildina fyri einum langtíðar farloyvi, kann borgarstjórin skipa fyri, at næsti persónur á viðkomandi vallista tekur sæti í bæði nevndum og býráði fyri býráðslimin í farloyvi, og síðan verður farloyvið eftirfylgjandi lagt fyri fyrst komandi býráðsfundin til samtyktar og staðfestingar.*

  *Um tað hinvegin eru orsøkir til iva um onkur viðurskifti í sambandi við umsóknina um langtíðar farloyvi, verður bíðað við at kalla næsta persón á viðkomandi vallista inn í sambandi við nevndarfundirnar, til málið um farloyvið er viðgjørt og samtykt av býráðnum. Eftir tað tekur vara-býráðslimurin sæti í bæði nevndum og býráði fyri býráðslimin í farloyvi.*

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Fundarsamsýningar til tiltakslimin.

**Tilmæli:**
Heitt verður á býráðið um at samtykkja og staðfesta farloyvisumbøn frá Gunvá við Keldu, samstundis sum samtykt og staðfest verður, at Símun á Høvdanum tekur sæti í avvarðandi nevndum og býráðnum frá 1. september til 30. november 2022.

**Klaksvíkar Býráð 29. september 2022:**
Tilmælið, dagf. 22-09-2022, einmælt samtykt.

## 68/22
## 22/01259-4 Innstilling til val av limum í Føroyagrunnin frá 1971

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 27.09.2022 | 54/22 |
| 2 Klaksvíkar Býráð | 29.09.2022 | 68/22 |

**Frágreiðing um málið:**
Viðtøkurnar fyri Føroyagrunnin frá 1971 áseta, at tann eini limurin í nevndini, ið landstýrismaðurin tilnevnir, skal verða útnevndur eftir innstilling frá Klaksvíkar kommunu.

Í skrivi frá Fíggjarmálaráðnum dagf. 14. juni 2022 verður heitt á kommununa um at innstilla minst trý evni til nevndina í grunninum. Heitt verður eisini á kommununa um at taka atlit til javnstøðu millum kynini og innstilla bæði kvinnur og menn.

Í løtuni er Hilmar K. Danielsen valdur sum stýrislimur, hansara skeið endaði 1. august 2022. Viðmerkjast kann, at somu persónar kunnu veljast aftur.

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

Skotið verður upp at innstilla hesi: Hilmar K. Danielsen, Súsanna Olsen og Óli Marner Christiansen.

**Lógargrundarlag:**
Viðtøkur fyri Føroyagrunnin frá 1971.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Ongar

**Tilmæli:**
Heitt verður hervið á fíggjarnevndina/býráðið um at innstilla trý evni til stýrið fyri Føroyagrunnin frá 1971.

**Fíggjarnevndin 27. september 2022:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 22-09-2022.

**Klaksvíkar Býráð 29. september 2022:**
*Jóhanna C. Christiansen luttók ikki í viðgerðini av málinum vegna ógegni*
Tilmælið frá FíN 27-09-2022 einmælt samtykt.

## 69/22
## 22/01247-3 Viðtøkubroytingar og val av nevndarlimi í grunnin Íverksetarahúsið - góðkenning

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Havna- og Vinnunevndin | 21.09.2022 | 40/22 |
| 2 Fíggjarnevndin | 27.09.2022 | 53/22 |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 29.09.2022 | 69/22 |

**Frágreiðing um málið:**
Áheitan er komin frá stjóranum í Íverksetarahúsinum um góðkenning av broyttum viðtøkum og vali av nýggjum nevndarlimi.

Høvuðsstuðulin, Føroya Tele, hevur valt at siga samstarvið upp, og tí skjýtur nevndin í Íverksetarahúsinum upp, at grein 7 í viðtøkunum um nevndarsamanseting verður broytt, umframt at nýggjur limur verður valdur í nevndina. Nevndin ynskir, at tað ikki skal verða eitt krav í viðtøkunum um ein høvuðsstuðul.

Fundur hevur verið millum Íverksetarahúsið og Umhvørvis- og vinnumálaráðið um hetta.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið tekur undir við, at tað ikki longur verður eitt krav, at Íverksetarahúsið hevur ein høvuðsstuðul. Umhvørvis- og vinnumálaráðið heldur eisini, at viðtøkurnar eiga at verða broyttar til, at landsstýrismaðurin í Vinnumálum velur tveir nevndarlimir og Klaksvíkar kommuna ein, og at tað er landsstýrismaðurin, sum velur formannin millum hesar tríggjar. Umhvørvis- og vinnumálaráðið heldur harumframt, at tað eigur at standa í viðtøkunum, at nevndarlimirnir verða valdir á aðalfundinum, fyri tvey ár í senn. Og at eins og nú skal eingin nevndarlimur sita longur enn átta ár.
Umhvørvis- og vinnumálaráðið váttar eisini, at landsstýrismaðurin góðkennir avgerðina hjá nevndini um at velja Rógva Róin til nýggjan nevndarlim, og valskeiðið verður til aðalfundin á vári 2024.

**Lógargrundarlag:**
Viðtøkur fyri grunnin Íverksetarahúsið

**Fíggjarligar avleiðingar:**

**Tilmæli:**
Mælt verður til at góðkenna broytingarnar í viðtøkunum (gr. 7, Nevnd) umframt at góðkenna valið av Rógva Róin til nýggjan nevndarlim.

**Havna- og Vinnunevndin 21. september 2022:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum dagf. 13-09-2022.

**Fíggjarnevndin 27. september 2022:**
Nevndin tekur undir við HaVN 21-09-2022. Nevndin mælir til at taka málið um at endurskoða viðtøkurnar upp aftur seinni.

**Klaksvíkar Býráð 29. september 2022:**
Tilmælið frá FíN 27-09-2022 einmælt samtykt.

## 70/22
## 22/01408-19 Fíggjarætlan Klaksvíkar Sløkkiliðs fyri 2023 til góðkenningar

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska Nevnd | 21.09.2022 | K-26/22 |
| 2 Fíggjarnevndin | 27.09.2022 | K-18/22 |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 29.09.2022 | 70/22 |

**Frágreiðing um málið:**
Sum kunnugt samstarva kommunurnar í Norðoyggjum um tilbúgving gjøgnum samstarvið “Klaksvíkar Sløkkilið”, har samstarvsavtala millum partarnar ásetir fíggingina.

Sambært pkt. 8 “Fíggjarætlan – viðgerð v.m.” í samstarvsavtaluni, skulu kommunustýrini góðkenna fíggjarætlanina eftir tilmæli frá tilbúgvingarnevndini. Tilbúgvingarnevndin hevur í t-posti 23. august 2023 heitt á kommunustýrini í samstarvinum um at viðgera og góðkenna fíggjarætlanina fyri Klaksvíkar Sløkkilið fyri 2023, sum samtykt av nevndini 22. aug. 2022.

Tilbúgvingarnevndin hevur samtykt eina rakstrarjáttanin upp á 2.520.000 kr. og íløgur upp á 1.360.000 kr. (sí viðheftu samtykt).

Fíggjarligi býtislykilin millum kommunurnar í samstarvinum byggir á talið av borgarum í kommununum pr. 31. desember árið fyri, men av tí at íbúgvaratalið pr. 31.12.2022 (= ”*árið fyri*”) ikki er kent enn, byggir talvan niðanfyri á íbúgvaratalið pr. 31.07.2022*

| Kommuna | Íbúgvar pr. 31.07.2022* | Íbúgvar í % | Rakstrarjáttan pr. kommunu í kr. | Íløgujáttan pr. kommunu í kr. | Játtan pr. kommunu í kr. |
|---|---|---|---|---|---|
| Fugloyar kommuna | 38 | 0,6 | 15.082,69 kr. | 8.139,86 kr. | 23.222,55 kr. |
| Viðareiðis kommuna | 347 | 5,5 | 137.728,78 kr. | 74.329,82 kr. | 212.058,59 kr. |
| Hvannasunds kommuna | 419 | 6,6 | 166.306,50 kr. | 89.752,72 kr. | 256.059,22 kr. |
| Klaksvíkar kommuna | 5401 | 85,1 | 2.143.726,57 kr. | 1.156.931,80 kr. | 3.300.658,37 kr. |
| Kunoyar kommuna | 144 | 2,3 | 57.155,46 kr. | 30.845,80 kr. | 88.001,26 kr. |
| Tilsamans | 6349 | 100,0 | 2.520.000,00 kr. | 1.360.000,00 kr. | 3.880.000,00 kr. |

Kelda til íbúgvaratøl: www.hagstova.fo, 23-08-2022

**Lógargrundarlag:**
Tilbúgvingarlógin
Samstarvsavtala millum kommunurnar í Norðoyggjum um tilbúgving

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Um tikið verður undir við tilmælinum, má rakstrarjáttanin á 2.143.726,57 kr. og íløgur upp á 1.156.931.80 kr. takast við í fíggjarætlanina fyri 2023

**Tilmæli:**
Mælt verður býráðnum til at góðkenna fíggjarætlanina fyri Klaksvíkar Sløkkilið fyri 2023, sum samtykt av tilbúgvingarnevndini 22. aug. 2022.

**Tekniska Nevnd 21. september 2022:**
Málið verið til kunningar.

**Fíggjarnevndin 27. september 2022:**
Málið verið til kunningar.

**Klaksvíkar Býráð 29. september 2022:**
Einmælt samtykt at góðkenna fíggjarætlan Klaksvíkar Sløkkiliðs fyri 2023, sum samtykt av Tilbúgvingarnevndini 22. aug. 2022.

## 71/22
## 21/01969-1 Reglugerð fyri víðarisølu av kommunalum grundstykkjum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 19.09.2022 | 100/22 |
| 2 Fíggjarnevndin | 27.09.2022 | 55/22 |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 29.09.2022 | 71/22 |

**Frágreiðing um málið:**
Vísandi til nógvu umsóknirnar um víðarisølu og innlating av útgrivnum kommunalum grundstykkjum hevur fyrisitingin orðað eina mannagongd og nýggjan leist til, hvussu slíkir fyrispurningar framyvir kunnu loysast.

*Vinaliga sí hjálagt skjal: Uppskot - Reglugerð fyri víðarisølu av kommunalum grundstykkjum.*

Sostatt verða einans óútgrivin grundstykkir tikin inn og endurgjald latið.

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

Er arbeiði framt á grundstykkinum verður víst til reglugerð fyri víðarisølu av kommunalum grundstykkjum framyvir. Uttan so, kommunan sjálv hevur eina ætlan við einum útgrivnum grundstykki, sum tað verður lýst í reglugerðini.

**Lógargrundarlag:**
Kommunufulltrúin

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Ongar

**Tilmæli:**
Mælt verður til, at nevnd og býráð umrøða og viðgera reglugerð fyri víðarisølu av kommunalum grundstykkjum og innlating av óútgrivnum grundstykkjum.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 19. september 2022:**
Nevndin tekur undir við uppskotinum til reglugerð fyri víðarisølu av útgrivnum og byggibúnum kommunalum grundstykkjum; tó við teirri broyting, at kommunan ikki ber nakran kostnað av metingini.

**Fíggjarnevndin 27. september 2022:**
Nevndin tekur undir við UBN 19-09-2022.

**Klaksvíkar Býráð 29. september 2022:**
Tilmælið frá FíN 27-09-2022 einmælt samtykt.

## 72/22
## 21/01604-2 Broyting av byggisamtykt fyri D1, D36 og C19, Norðoyri

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Norðoyrarnevndin | 30.08.2022 | 6/22 |
| 2 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 19.09.2022 | 109/22 |
| 3 Trivnaðarnevndin Eldri og Bústaðir | 20.09.2022 | 31/22 |
| 4 Havna- og Vinnunevndin | 21.09.2022 | 42/22 |
| 5 Klaksvíkar Býráð | 29.09.2022 | 72/22 |

**Frágreiðing um málið:**
Víst verður til býráðssamtykt 27. mai. 2021, har meirilutin samtykti, at arbeiðast skuldi víðari við ætlaðu byggisamtyktarbroyting.
Fyrispurningur um keyp av lendi verður ikki viðgjørdur á hesum sinni!

Fyrisitingin hevur arbeitt við einum uppskoti, har partur av matr.nr. 25a er deildur í tveir økispartar C19 (niðanfyri vegin) ætlað til alment endamál so sum røktarheim oa., og fjøran verður partur av dagførda D36, sum er ætlað til neystabygging.
Hetta merkir, at talan er um ein nýggjan økispart C19 (litað gult) og eina víðkan av D36 (innrammað við turkis), sum hevur við sær eina broyting millum økismørkini D1 og D36.




*Broytingaruppskot D36 og C19*




*Galdandi byggisamtykt*

Byggisamtyktarbroytingar hava nýliga verið fyri D36, og liggur málið til viðger og góðkenning hjá UVMR í verandi løtu.

Nýggj økisbløð fyri C19 og D36 eru hjáløgd.

**Lógargrundarlag:**
Løgtingslóg nr. 13 um býarskipanir og byggisamtyktir.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Ikki ísb. við byggisamtyktarbroytingina.

**Tilmæli:**
Av tí at spurningur um staðseting av nýggjum røktarheimi ikki er avgreiddur enn, verður mælt til

1. at fara undir tilgongdina við byggisamtyktarbroyting av D36 (neystaøkinum), sum víst omanfyri
2. at bíða við byggisamtyktarbroyting til C19, til meira ítøkiligar ætlanir fyriliggja við økinum

**Norðoyrarnevndin 30. august 2022:**
Ein meiriluti, Karl Johansen, Tummas J. Lervig, Jan H. Askham og Jana Skoradal, taka undir við tilmæli frá umsitingini dagf. 19-08-2022. Ein minniluti, Hjørdis Hávarsá tekur ikki undir við málinum.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 19. september 2022:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 19-08-2022.

**Trivnaðarnevndin Eldri og Bústaðir 20. september 2022:**
Nevndin tekur undir við UBN 19.09.22.

**Havna- og Vinnunevndin 21. september 2022:**
Nevndin tekur undir við TrN E&B dagf. 19-09-2022

**Klaksvíkar Býráð 29. september 2022:**
Tilmælið frá HaVN 21-09-2022 einmælt samtykt.

## 73/22
## 22/00353-10 Umsókn um umbygging av neysti á Flesjum, matr.nr. 916

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 19.09.2022 | 117/22 |
| 2 Havna- og Vinnunevndin | 21.09.2022 | 48/22 |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 29.09.2022 | 73/22 |

**Frágreiðing um málið:**
Ánari av matr.nr 916 søkir um loyvi at umbyggja neyst sítt.
Talan er um at hækka tekjuna og vangarnar, gera altan eystur og seta vindeyga í suðureftir.

Sunnanfyri ætlaðu umbyggingina av neystinum hevur kommunan havt ætlanir um at byggja neyst til frama fyri borgarar í kommununi.

**Lógargrundarlag:**
BK 17, Almenna byggisamtyktin og ásetingar fyri øki D1 *"(Grønt øki, Fríøki) støða verða tikin til neystabygging í hvørjum einstøkum føri (friðingarmyndugleikar)."*

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Ongar

**Tilmæli:**
Umbyggingin kemur ikki at ávirka ætlanirnar hjá kommununi, og er umbyggingin innanfyri ásetingarnar í økinum. Mælt verður til at játta umsókn um umbygging.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 19. september 2022:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 13-09-2022.

**Havna- og Vinnunevndin 21. september 2022:**
Nevndin tekur undir við UBN dagf. 19.09.2022.

**Klaksvíkar Býráð 29. september 2022:**
Tilmælið frá HaVN 21-09-2022 einmælt samtykt.

## 74/22
## 22/01416-6 Umsókn um umbygging av seyðahúsi - matr.nr. 59b, Árnafjørður

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Árnafjarðarnevndin | 30.08.2022 | 7/22 |
| 2 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 19.09.2022 | 124/22 |
| 3 Havna- og Vinnunevndin | 21.09.2022 | 50/22 |
| 4 Klaksvíkar Býráð | 29.09.2022 | 74/22 |

**Frágreiðing um málið:**
Ánari av matr.nr. 59b søkir um byggiloyvi til umbygging av seyðahúsinum. Talan er um nýgerð og umskapan av yvirtrom umframt broyting av innrætting. Mønin verður í upprunaligu hæddini, men verður takhallið broytt, og síðurnar verða hækkaðar.

**Lógargrundarlag:**
Økið er útlagt til "Grønt øki". Á matriklinum kann vera fult bygt, men bert endurreising kann verða loyvd.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Ongar.

**Tilmæli:**
Mælt verður til at játta umsóknini til umbygging av seyðahúsi á matr. 59b, Árnafjørður.

**Árnafjarðarnevndin 30. august 2022:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum dagf. 23-08-2022, sambært innsendum tekningum og umsókn. Niclas Fredrik Justinussen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 19. september 2022:**
Nevndin tekur undir við Árnafjarðarnevndini 30-08-2022.

**Havna- og Vinnunevndin 21. september 2022:**
*Atli S. Justinussen luttók ikki á fundinum vegna ógegni.*
Nevndin tekur undir við tilmælinum dagf. 19-09-2022.

**Klaksvíkar Býráð 29. september 2022:**
*Atli S. Justinussen luttók ikki í viðgerðini av málinum vegna ógegni.*
Tilmælið frá HaVN 21-09-2022 einmælt samtykt.

## 75/22
## 22/01445-6 Umsókn um loyvi at bora eftir jarðhita í fjøruni, matr.nr. 1366a, Klaksvík.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 19.09.2022 | 123/22 |
| 2 Havna- og Vinnunevndin | 21.09.2022 | 47/22 |
| 3 Tekniska Nevnd | 21.09.2022 | 73/22 |
| 4 Klaksvíkar Býráð | 29.09.2022 | 75/22 |

**Frágreiðing um málið:**
Ánari av matr.nr. 1366a søkir um loyvi at bora eftir jarðhita uttanfyri matrikulin, í fjøruni norðanfyri Biskopstø. Grundin til tess er, at Umhvørvisstovan hevur gjørt vart við, at borihol, har frástøðan er minni enn 20 metrar ímillum holini, kunnu taka hita frá hvørjum øðrum, og er ikki møguleiki at bora frammanfyri húsini, tá tað gerst ov nær øðrum jarðhitaholi. Fyri at fremja arbeiðið má tilfar leggjast í fjøruna soleiðis at boritornið sleppur framat staðsetingini.

Sambært miðbýarætlanini hevur verið ætlan at gera eina gonguleið, sum bindur økið við Nólsoyar Pálsgarð við miðbýin og økið við bátabrúgvarnar. Tað er lýst yvirskipað í Skipanaruppskotinum frá 2015. Sera týdningarmikið, at hesi viðurskiftini verða tikin við, tá tað ræður um nýggj átøk í økinum.

Tekniska fyrisiting hevur verið í samband við aðrar kommunur viðv. royndum innan jarðhitaboringar í fjøruni, og hevur eingin teirra royndir innan hetta. Tó er ikki óvanligt at bora verður uttanfyri matriklar.

**Lógargrundarlag:**
Umhvørvisstovan (Hoyringspartur), Miðbýarætlanin, Almenna bygningskunngerðin og BK-17.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Ongar

**Tilmæli:**
Tekniska fyrisiting mælir til at játta umsóknini við tí treyt, at umsøkjari skipar soleiðis fyri, at tá arbeiðið er liðugt, verður fjøran og umhvørvi sum ávirkast pga. arbeiðinum, gjørt í sama stand, og at jarðhitaholið verður borað so tætt inn at vesturveggi og húsunum sum møguligt, fyri at sum minst møguligt ávirka framtíðar verkætlanir.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 19. september 2022:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 13-09-2022.

**Havna- og Vinnunevndin 21. september 2022:**
Nevndin tekur undir við UBN dagf. 19-09-2022.

**Tekniska Nevnd 21. september 2022:**
Nevndin tekur undir við HaVN 21-09-2022.

**Klaksvíkar Býráð 29. september 2022:**
Tilmælið frá TN 21-09-2022 einmælt samtykt.

## 76/22
## 22/00816-5 Umsókn um uppíbygging til goymslubingjur og reinsitanga, matr.nr. 163ad, Klaksvík

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 19.09.2022 | 118/22 |
| 2 Havna- og Vinnunevndin | 21.09.2022 | 49/22 |
| 3 Tekniska Nevnd | 21.09.2022 | 69/22 |
| 4 Klaksvíkar Býráð | 29.09.2022 | 76/22 |

**Frágreiðing um málið:**
POMEK ynskir at útbyggja pláss til goymslubingjur og reinsitanga.
Útbyggingin skal verða 7,5 m eystur, ímóti kaikantinum, og 9,6 m norður/suður. Hæddin á byggingini verður 3,37 m - umframt gelendara á 0,9 m. Frástøða frá útbyggingini til kaikant verður uml. 12,8 m.

**Lógargrundarlag:**
B8 (Havnaøki uttanfyri Norðborg), almenna byggisamtyktin og BK 17

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Ongar

**Tilmæli:**
Tekniska fyrisiting mælir til at játta umsóknini, við tí grundgeving at loyvi hevur áður verið givið til onnur líknandi bygningsframskot nærri kaikantinum – niður í 12,5 m frá kaikantinum. Staðsetingin av útbyggingini er ikki til hindurs fyri ferðslu ella annað virksemi framvið kaikantinum.

Byggingin krevur víðkan av verandi leiguøki. - Við játtan av byggiloyvi verður mælt til, at matrikulin verður víðkaður við uml. 70 $m^2$ og átekning gjørd í leigusáttmálanum um hetta.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 19. september 2022:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 13-09-2022.

**Havna- og Vinnunevndin 21. september 2022:**
Nevndin tekur undr við UBN dagf. 19-09-2022.

**Tekniska Nevnd 21. september 2022:**
Nevndin tekur undir við HaVN 21-09-2022.

**Klaksvíkar Býráð 29. september 2022:**
Tilmælið frá TN 21-09-2022 einmælt samtykt.

## 77/22
## 22/00894-3 Umsókn um byggiloyvi til altan og hjall, matr.nr. 746p, Klaksvík

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 19.09.2022 | 119/22 |
| 2 Tekniska Nevnd | 21.09.2022 | 70/22 |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 29.09.2022 | 77/22 |

**Frágreiðing um málið:**
Malltek søkir vegna ánara av matr.nr. 746p um loyvi at útbyggja, út á mark, verandi altan, lívdarvegg og hjall.
Viðmerkjast skal, at kommunan er granni, og er spælipláss á økinum.

**Lógargrundarlag:**
BK 17, Almenna byggisamtyktin og ásetingar fyri øki A4 (blandað íbúðar- og vinnuøkið)

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Ongar

**Tilmæli:**
Verandi bilhús stendur í mark, og verður útbyggingin av hjallinum ein víðkan av eystursíðuni. Samlaða longdin verður 8 m, sum er loyvt sambært BK17. Hæddin á hjallinum verður tann sama sum á bilhúsinum 2,8 m, sum er 30 cm meir enn loyvt sambært BK17. Tekniska fyrisiting mælir til at geva frávik og játta umsókníni.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 19. september 2022:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 13-09-2022.

**Tekniska Nevnd 21. september 2022:**
Málið verið til kunningar.

**Klaksvíkar Býráð 29. september 2022:**
Tilmælið frá UBN 19-09-2022 einmælt samtykt.

## 78/22
## 22/01011-5 Umsókn um byggiloyvi til bilhús, matr.nr. 1252, Klaksvík

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 19.09.2022 | 120/22 |
| 2 Tekniska Nevnd | 21.09.2022 | 71/22 |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 29.09.2022 | 78/22 |

**Frágreiðing um málið:**
Ánari av matr.nr. 1252, Klaksvík, søkir um undantaksloyvi at byggja bilhús hægri enn loyvdu 2,5 m innanfyri 2,5 m frástøðu frá grannamarki.

**Lógargrundarlag:**
BK 17, Almenna byggisamtyktin og A10 (blandað íbúðar- og vinnuøkið)

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Ongar

**Tilmæli:**
Umsøkjari hevur fingið grannaloyvi frá ánara, sum bygt verður ímóti (norðanfyri). Ætlaða byggingin kann tó órógva grannar omanfyri vegin og ávirka framtíðar møguleikar á ognini norðanfyri. Tekniska fyrisiting mælir til at loyva bygging á í mesta lagi 3,18 m hædd (2,5 m omanfyri dekkið) innanfyri fráleika á 2,5 m til grannamark.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 19. september 2022:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 13-09-2022, og minnir á at senda málið til grannahoyring hjá øllum avvarðandi grannum.

**Tekniska Nevnd 21. september 2022:**
Málið verið til kunningar.

**Klaksvíkar Býráð 29. september 2022:**
Tilmælið frá UBN 19-09-2022 einmælt samtykt.

*Atli S. Justinussen fór av fundinum kl. 18:10 beint undan viðgerðini av máli 79/22*

## 79/22
## 22/01214-7 Umsókn um at taka bygning niður á Lávíkarbrekku

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 19.09.2022 | 122/22 |
| 2 Tekniska Nevnd | 21.09.2022 | 72/22 |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 29.09.2022 | 79/22 |

**Frágreiðing um málið:**
Ánari av matr.nr 333 og 332a ynskir at taka tvíhúsini niður, og byggja 3 samanbygdar leiguíbúðir á økinum. Omanfyri húsini skal vera pláss til parkering, og niðanfyri skulu verða terrassur/altanir.

Nevnast kann, at hetta er ímillum elstu bygningar í Klaksvík, og er hann nevndur í Varðveitingarlistanum hjá kommununi.

Umboð frá teknisku fyrisiting hava verið og kannað húsini og hugt at standinum.

Tekniska fyrisiting hevur verið í samband við Norðoya Fornminnasavn, har tey vísa á, at húsini kundu verið máld upp og skjalfest við tekningum og myndum, og annars kundi verið mælt til, at broytingar av húsunum verða framdar við virðing fyri uppruna byggistílinum.

Vegna vantandi heimild viðv. varðveitan, kann kommunan ístaðin eggja umsøkjara at varðveita grótlaðing og skjøldrar, í tann mun tað letur seg gera, í mun til ætlaðu verkætlan.

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

Kommunan hevur ongar ítøkiligar ætlanir við nevndu matriklum.

**Lógargrundarlag:**
Eingin varðveitingarskylda er lýst yvir ognina.

**Varðveitingarlistin** - Bygningurin er á varðveitingarlistanum markeraður við reyðum: "Bólkurin mælir til, at bygningar/støð – merkt við reyðlitaðari markering - verða varðveitt"
Um bygningin verður sagt *"**VÁ 05 Húsini hjá Jóan Paula og Poul Johannes í Horni (35)***
*Húsini eru samanbygd. Jóan Pauli byggir í 1884, og sonurin Poul Johannes byggir uppí heimanfyri seinni"*

Almenna byggisamtyktin, A5 og BK17

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Ongar

**Tilmæli:**
Tekniska fyrisiting mælir til at loyva niðurtøku av bygninginum, tí sambært BK17 er einki, ið forðar fyri at játta umsóknini.
Tekniska fyrisiting mælir eisini til, at Norðoya Fornminnasavn kann taka stig til at uppmála og skjalfesta ognina áðrenn niðurtøku.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 19. september 2022:**
*Signhild V. Johannesen luttók ikki í viðgerðini av málinum vegna ógegni.*

Ein minniluti, OáL og SáH, tekur undir við tilmælinum, dagf. 13-09-2022, og mælir til, at ein møgulig nýbygging virðir upprunaliga byggistílin.
Ein annar minniluti, ASB, mælir frá at loyva niðurtøku av húsunum, vísandi til søguvirðið.
JS tekur støðu í býráðnum.

**Tekniska Nevnd 21. september 2022:**
Málið verið til kunningar.

**Klaksvíkar Býráð 29. september 2022:**
*Signhild V. Johannesen luttók ikki í viðgerðini av málinum vegna ógegni.*

Einmælt samtykt at senda málið aftur í umsitingina at fáa eina byggifrøðiliga meting av støðuni av húsunum. Málið verður at leggja fyri aftur.

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

## 80/22
## 21/01334-18 Stangavegurin - marknaumskipan millum matr.nr. 1158 og 1160

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Ferðslunevndin | 19.09.2022 | 50/22 |
| 2 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 19.09.2022 | 125/22 |
| 3 Tekniska Nevnd | 21.09.2022 | 62/22 |
| 4 Klaksvíkar Býráð | 29.09.2022 | 80/22 |

**Frágreiðing um málið:**
Víst verður til málið um dagføring av Stangavegnum, tann partin av vegnum, har Garðabrekkan er íbundin Stangavegin.

Fyrisitingin hevur samskift við eigaran av matr.nr. 1158 út frá vegaprojektinum, sum Verkfo hevur gjørt fyri kommununa, har atkoman til stykkið (matr.nr. 1158) verður frá Garðabrekkuni, og ikki frá Stangavegnum. Eigarin hevur upplýst, at tikið verður undir við einari marknaumskipan, har kommunan fær uml. 58 fermetrar til vegin burtur av matr.nr. 1158, og matr.nr. 1158 fær 46 fermetrar burtur av matr.nr. 1160.

Málið verður tikið fram nú, tí eigarin av matr.nr. 1158 ynskir, at ein fyribils atkoma verður gjørd til stykkið frá Garðabrekkuni, tí hetta fer at gera tað lættari hjá eigara at fremja ábøtur á sethúsini/ognina. Í hesum sambandi verður neyðugt at flyta hjallin á matr.nr. 1160, sum er ogn hjá kommununi. Seinni, tá vegaprojektið verður framt, verður nevnda íbinding gjørd varandi.

Fyrisitingin tekur undir við marknaumskipanini og við ynskinum um, at ein fyribils atkoma verður gjørd til matr.nr. 1158. Mettur kostnaður er kr. 50.000,-, og verður arbeiðið fíggjað av *Vegir Íløgur, Stangavegurin*.

**Lógargrundarlag:**
Kommunufulltrúin

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Kostnaðurin kr. 50.000,- verður fíggjaður av *Vegir Íløgur, Stangavegurin*, har peningur er tøkur.

**Tilmæli:**
Við hesum verður mælt viðkomandi nevndum og býráði til at taka undir við marknaumskipanini og við fyribilsvegnum til matr.nr. 1158.

**Ferðslunevndin 20. juni 2022:**
Nevndin mælir til at útseta málið til næsta nevndarumfar.

**Ferðslunevndin 19. september 2022:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 12-06-2022.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 19. september 2022:**
Ein meiriluti, OáL, SáH, JS og SVJ, tekur undir við FeN 19-09-2022.
ASB tekur støðu í býráðnum.

**Tekniska Nevnd 21. september 2022:**
*Óli M. Lassen luttók ikki í viðgerðini av málinum vegna ógegni.*

Nevndin tekur undir við meirilutanum í UBN 19-09-2022.

**Klaksvíkar Býráð 29. september 2022:**
*Óli M. Lassen luttók ikki í viðgerðini av málinum vegna ógegni.*

Atkvøtt varð um meirilutatilmælið frá UBN 19-09-2022; tað varð samtykt við 7 atkvøðum fyri (KHJ, SáH, OáL, JCC, EÓP, JS og TJL) og 2 atkvøðum í móti (ASB og SVJ).

## 81/22
## 22/01236-1 Marknaumskipan ísv. útbygging á matr.nr. 54b í Ánunum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Ánanevndin | 30.08.2022 | K-1/22 |
| 2 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 19.09.2022 | 113/22 |
| 3 Havna- og Vinnunevndin | 21.09.2022 | 46/22 |
| 4 Fíggjarnevndin | 27.09.2022 | 69/22 |
| 5 Klaksvíkar Býráð | 29.09.2022 | 81/22 |

**Frágreiðing um málið:**
Í samband játtað byggiloyvi til útbygging av frystihúsinum í Ánunum verður neyðugt at víðka leiguøkið við uml. 940 $m^2$.

Viðheftu umsóknarskjøl verða send Umhvørvisstovuni til góðkenningar, tá umskipanin er samtykt av býráðnum.



**Lógargrundarlag:**
Matrikullógin

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Árlig meirinntøka fyri leigu: kr. 17.390,-

**Tilmæli:**
Mælt verður til at viðmæla marknaumskipanini sum víst á viðhefta umsóknarblaðið við kortskjali

**Ánanevndin 30. august 2022:**
Nevndin tekur undir við tilmæli frá umsitingini dagf. 18-08-2022.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 19. september 2022:**
Nevndin tekur undir við Ánanevndini 30-08-2022.

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

**Havna- og Vinnunevndin 21. september 2022:**
Nevndin tekur undir við UBN dagf. 19-09-2022.

**Fíggjarnevndin 27. september 2022:**
Nevndin tekur undir við HaVN 21-09-2022.

**Klaksvíkar Býráð 29. september 2022:**
Tilmælið frá FíN 27-09-2022 einmælt samtykt.

## 82/22
## 22/01458-2 Umsókn um marknaumskipan við Borðoyarvík, matr.nr. 875 v.fl

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 19.09.2022 | 112/22 |
| 2 Havna- og Vinnunevndin | 21.09.2022 | 44/22 |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 29.09.2022 | 82/22 |

**Frágreiðing um málið:**
Eigararnir av matr.nr. 874b, 874c, 874d, 874e og 875 søkja um marknaumskipan millum nevndu ognir. Við marknaumskipanini verða 4 smá grundøkir ummatrikuleraði til 3 størri.

Tekniska Umsiting hevur hesar viðmerkingar:
Byggisamtyktarliga er talan um økispart D1 – Grønt øki har støða verður tikin til neystabygging í hvørjum einstøkum føri. (Friðingarmyndugleikar)
Umskipanin liggur uttanfyri byggilinjuna hjá Landsverk

**Lógargrundarlag:**
Matrikullógin

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Kommunan bert ummælandi partur

**Tilmæli:**
Treytað av, at Friðingarmyndugleikarnir góðkenna bygging á økinum, hevur Tekniska Umsiting ongar viðmerkingar til umskipanina.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 19. september 2022:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 12-09-2022.

**Havna- og Vinnunevndin 21. september 2022:**
Nevndin tekur undir við UbN dagf. 12-09-2022.

**Klaksvíkar Býráð 29. september 2022:**
Tilmælið frá HaVN 21-09-2022 einmælt samtykt.

## 83/22
## 21/01339-9 Nýggj høvuðsvatnleiðing í samband við tunlarnar norður um fjall

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska Nevnd | 21.09.2022 | 61/22 |
| 2 Fíggjarnevndin | 27.09.2022 | 66/22 |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 29.09.2022 | 83/22 |

**Frágreiðing um málið:**
Í skrivi frá umsitingini 5. sept. 2022 verður greitt nærri frá málinum.

Landsverk hevur vent sær til Klaksvíkar kommunu við einum fyrispurningi um ein nýggjan høvuðsvatnleiðing í samband við arbeiðið at tillaga landsvegin til nýggja tunnilin til Árnafjarðar.

Klaksvíkar kommuna hevur ein høvuðsvatnleiðing liggjandi í landsvegnum. Leiðingin fer frá vatnverkinum við Ánagjógv og víðari heim í býin. Nevnda leiðing er uml. 40 ára gomul, og trupulleikar við brádligum leka á leiðingini eru komnir fyri nakrar ferðir, og seinastu 2 árini eru lekar staðfestir 3 ferðir. Óneyðugt at siga, so liggur eystursíðan av Klaksvíkini uttan vatn, tá leiðingin fer.

Fyrisitingin mælir til, at kommunan hevur ein málsetning um, at tvær høvuðsvatnleiðingar eru frá vatnverkinum við Ánagjógv til Klaksvíkar fyri at bøta um vatnveitingartrygdina.

Vatnleiðing í nýggja landsvegnum til tunnilin, uml. 500 metrar, kann verða byrjanin til nýggju leiðingina til Klaksvíkar. Eftir eru tá einir 1.700 metrar av nýggjari vatnleiðing at leggja.

**Lógargrundarlag:**
Kommunufulltrúin.
Millum aðrar hesar lógir og kunngerðir:
Kunngerð nr. 127 frá 22. november 2013 um veiting av drekkivatni, sum broytt við kunngerð nr. 103 frá 9. juli 2019.
Løgtingslóg nr. 61 frá 15. mai 2012 um tilbúgving, sum broytt við løgtingslóg nr. 91 frá 7. juni 2020.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Málið hevur ongar fíggjarligar avleiðingar fyri fíggjarætlanina fyri 2022.

**Fíggjarligar avleiðingar fyri fíggjarætlanina í 2023:**
Um so verður, at kommunan tekur avgerð um at leggja nýggja vatnleiðing í landsvegin, so upplýsir Landsverk, at gjaldið - kr. 530.000,00 - fellur í 2023.

At leggja nýggja leiðing frá vatnverkinum við Ánagjógv til Klaksvíkar er eitt skundmál, sum ikki tolir at bíða í fleiri ár. Orsøkin er, at um illa veit við, so kann eystursíðan liggja uttan vatnveiting í nógvar tímar, og um heilt illa veit við, í dagar.

Víst verður til seinastu hendingina, tá tað gekk væl at umvæla lekan. Tá lá eystursíðan við ongum drekkivatni einar 8 tímar.

**Tilmæli:**
Tilmæli 1 (uml. 500 metrar av leiðing):

Í fyrsta umfari verða viðkomandi nevndir og býráð biðin um at taka støðu til fyrsta partin av málinum, sum er ein nýggj vatnleiðing uppá 500 metrar fyri ein kostnað uppá kr. 530.000,-. Neyðugt er, at býráðið bindur seg til at seta upphæddina av í 2023.

Tilmæli 2 (uml. 1700 metrar av leiðing afturat):
Í øðrum lagi verður heitt á viðkomandi nevndir og býráð um at viðgera málið um eina nýggja vatnleiðing frá Ánagjógv til Klaksvíkar (írestandi vegatein) uppá 1700 metrar fyri ein mettan kostnað uppá 2,35 mió. kr. Talan er um eitt átrokandi mál.

Sambært hesum kostar samlaða arbeiðið at leggja nýggja vatnleiðing frá Ánagjógv til Klaksvíkar 2,9 mió. kr.

**Tekniska Nevnd 21. september 2022:**
Nevndin tekur undir við málinum og mælir til, at tilmæli 1 (500 m) verður at fíggja í 2023.

**Fíggjarnevndin 27. september 2022:**
Nevndin tekur undir við TN 21-09-2022.

**Klaksvíkar Býráð 29. september 2022:**
Tilmælið frá FíN 27-09-2022 einmælt samtykt.

**84/22**
**21/02151-41 Vegir, Íløgur, 2022: avseting til Gøtuljós íløgur og Vatnveiting íløgur - *flyting millum kontur, seinna viðgerð***

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska Nevnd | 22.06.2022 | 51/22 |
| 2 Fíggjarnevndin | 28.06.2022 | 42/22 |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 30.06.2022 | 59/22 |
| 4 Klaksvíkar Býráð | 29.09.2022 | 84/22 |

**Frágreiðing um málið:**
Málið varð fyrru ferð viðgjørt av býráðnum 30. juni 2022.

**Tekniska Nevnd 22. juni 2022:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 14-06-2022.

**Fíggjarnevndin 28. juni 2022:**
Nevndin tekur undir við TN 22. juni 2022.

**Klaksvíkar Býráð 30. juni 2022:**
Tilmælið frá FíN 28. juni 2022 einmælt samtykt.

**Klaksvíkar Býráð 29. september 2022:**
Tilmælið frá BýR 30-06-2022 einmælt samtykt við seinnu viðgerð.

**85/22**
**22/01123-1 Hitavekslari til svimjihøllina - *flyting millum kontur, seinna viðgerð***

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Heilsunevndin | 20.06.2022 | 24/22 |
| 2 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 20.06.2022 | 96/22 |
| 3 Mentanarnevndin | 21.06.2022 | 44/22 |
| 4 Fíggjarnevndin | 28.06.2022 | 40/22 |
| 5 Klaksvíkar Býráð | 30.06.2022 | 57/22 |
| 6 Klaksvíkar Býráð | 29.09.2022 | 85/22 |

**Frágreiðing um málið:**
Málið varð fyrru ferð viðgjørt av býráðnum 30. juni 2022.

**Heilsunevndin 20. juni 2022:**
Heilsunevndin fegnast um, at átøk verða gjørd á grønu kósini.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 20. juni 2022:**
Nevndin staðfestir, at talan er um eina góða og neyðuga íløgu á grønu kósini og tekur tí undir við loysnini við hitavekslara.

**Mentanarnevndin 21. juni 2022:**
Nevndin ynskir at raðfesta, so íløga verður gjørd í hitavekslara til svimjihøllina, og mælir til, at íløgan verður fíggjað við umraðfesting á ítróttarøkinum íløga, har kr. 673.000 íroknað kommunu-mvg verða fluttar til svimjihøll íløga. Samstundis verður mælt til, at nevnda upphædd verður tikin við í fíggjarætlanina fyri 2023 innan stadionøkið íløga fyri at tryggja endaliga altjóða góðkenning av Djúpumýru í 2023.

**Fíggjarnevndin 28. juni 2022:**
Nevndin tekur undir við MeN 21. juni 2022.

**Klaksvíkar Býráð 30. juni 2022:**
*Annika S. Biskopstø luttók ikki í viðgerðini av málinum vegna ógegni.*

Tilmælið frá FíN 28. juni 2022 einmælt samtykt.

**Klaksvíkar Býráð 29. september 2022:**
*Annika S. Biskopstø luttók ikki í viðgerðini av málinum vegna ógegni.*

Tilmælið frá BýR 30-06-2022 einmælt samtykt við seinnu viðgerð.

## 86/22
## 22/01408-21 Fíggjarætlan 2023, Klaksvíkar Býráð - fíggjarkarmur 2023

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 27.09.2022 | 73/22 |
| 2 Klaksvíkar Býráð | 29.09.2022 | 86/22 |

**Frágreiðing um málið:**
Sambært kommunulógini skal býráðið samtykkja tann yvirskipaða fíggjarkarmin fyri komandi ár áðrenn 1. oktober.

KLAKSVÍKAR KOMMUNA Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

Talvan niðanfyri vísir uppskot til fíggjarkarm 2023 og gongdina seinastu 4 árini.
Inntøkurnar komandi ár eru settar til 310 mió.kr., og hava tær støði í uppgerðunum, sum FMR og Taks sendu út fyrst í september.

Raksturin er settur til 249 mió.kr., sum er 6 mió. kr. hægri enn avsetingin í 2022. Hetta svarar áleið til lønarvøksturin, sum er mettur til áleið 3%.

Avlopið frá rakstri er 61 mió. kr.

Við rentustuðli (4,2 mió.kr.) og rentugjaldingum (7 mió.kr.) er avlopið áðrenn íløgur og avdráttir 49,8 mió.kr.

| | | | | | Roknskapur 2022 | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | | | | Fíggjarætlan | | | Roknskapur | | |
| **Tkr** | **R 2018** | **R 2019** | **R 2020** | **R 2021** | **Uppruna-ætlan** | **Eyka-játtan** | **Dagførd ætlan** | **Meting roknskap 2022** | **Uppskot Æ2023** | **Munur M2022 Æ2023** |
| Inntøkur | 271.692 | 288.432 | 295.445 | 293.879 | 310.000 | 0 | 310.000 | 311.376 | 310.000 | -1.376 |
| Rakstrarútreiðslur | 198.982 | 202.913 | 226.618 | 240.189 | 242.476 | 500 | 242.976 | 245.071 | 249.000 | 3.929 |
| | 72.711 | 85.518 | 68.827 | 53.690 | 67.524 | -500 | 67.024 | 66.305 | 61.000 | -5.305 |
| | | | | | | | | | | |
| Stuðul rentuútreiðslur bústað | 3.648 | 3.675 | 3.754 | 3.794 | 3.800 | 0 | 3.800 | 3.837 | 4.200 | 363 |
| | 69.062 | 81.843 | 65.073 | 49.895 | 63.724 | -500 | 63.224 | 62.468 | 56.800 | -5.668 |
| | | | | | | | | | | |
| Rentugjaldingar | 6.315 | 3.076 | 3.065 | 3.538 | 4.200 | 0 | 4.200 | 4.817 | 7.000 | 2.183 |
| | | | | | | | | | | |
| **Úrslit áðrenn rentur og avdráttir** | **62.747** | **78.767** | **62.008** | **46.357** | **59.524** | **-500** | **59.024** | **57.651** | **49.800** | **-7.851** |
| | | | | | | | | | | |
| Íløgur | 75.855 | 106.293 | 118.929 | 148.771 | 78.400 | 18.100 | 96.500 | 96.714 | | |
| | | | | | | | | | | |
| **Úrslit áðrenn avdráttir** | **-13.108** | **-27.526** | **-56.921** | **-102.413** | **-18.876** | **-18.600** | **-37.476** | **-39.063** | **49.800** | **-7.851** |
| | | | | | | | | | | |
| **Lutfall rakstur og inntøkur (%)** | 73,2 | 70,4 | 76,7 | 81,7 | 78,2 | | 78,4 | 78,7 | 80,3 | |
| **Lutfall rakstur+rentur og inntøkur (%)** | 76,9 | 72,7 | 79,0 | 84,2 | 80,8 | | 81,0 | 81,5 | 83,9 | |

## Inntøkur

Í 2021 lækkaðu innntøkurnar 0,5% í mun til árið fyri, men í 2018-2020 hevur vøksturin ligið millum 1,4 og 6,2%.

Persónskatturin og forskattingin av eftirlønum hava verið hækkandi. FAS, DIS v.m. hevur verið á sama støði øll árini, meðan felagsskatturin hevur ligið millum 13,5 og 21 mió. kr.

| Roknskapur pr. 31-07-2022 + meting aug - des (útskrivað 21-09-2022) tkr | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | **RAKSTUR** | **R 2018** | **R2019** | **R2020** | **R2021** | **Uppruna-ætlan 2022** | **Eyka-játtan** | **Dagførd ætlan 2022** | **Meting rokn-skap 2022** | **Meting 2023** |
| § 20. | Kommunuskattur | 202.310 | 217.102 | 221.132 | 224.021 | 240.196 | | 240.196 | 237.033 | 233.000 |
| § 20 | Húsaleiguskattur | 154 | 62 | 7 | 4 | 0 | | 0 | 7 | |
| § 20 | Felagsskattur | 21.097 | 18.730 | 20.867 | 13.555 | 14.000 | | 14.000 | 16.406 | 16.000 |
| § 20 | Skattur av eftirlønarinngjøldum | 36.749 | 41.385 | 41.938 | 45.214 | 45.121 | | 45.121 | 46.984 | 50.763 |
| § 20 | Flyting vegna DIS, FAS og fradr | 11.381 | 11.152 | 11.501 | 11.085 | 10.683 | | 10.683 | 10.945 | 10.417 |
| | Inntøkur | 271.692 | 288.432 | 295.445 | 293.879 | 310.000 | 0 | 310.000 | 311.376 | 310.180 |
| | | | | | | | | | | |
| | **Vøkstur (%)** | **1,4** | **6,2** | **2,4** | **-0,5** | | | | **6,0** | **-0,4** |

Persónsskatturin (233 mió. kr.) og felagsskatturin (16 mió. kr.) eru metingar. Persónsskatturin liggur ca. miðskeiðis millum okkara framrokning av persónsskattinum og metingini hjá Taks. Skattur frá eftirlønum og DIS, FAS eru frá Taks.

Taks kemur seinni við nýggjari framrokning av persónsskatti og inntøkum ísbv. eldraøkið.

**Rakstur**
Í 2018 var raksturin 198,9 mió. kr., og seinasta framrokningin fyri 2022 vísir, at raksturin verður 245 mió. kr. Hetta gevur ein árligan vøkstur upp á 5,4%.

Lutfallið millum rakstur og inntøkur er 82,3% í mun til 73,2% í 2018.

Leggja vit rentstuðul + rentuútreiðslur afturat rakstrinum, er lutfallið 85,8% samanborið við 76,9% í 2018.

Avsetingin 2023 er 249 mió. kr., sum er 6 mió. kr. meira enn avsett í 2022. Hetta er áleið tað, sum lønirnar væntandi hækka komandi ár.

Lønirnar á privata arbeiðsmarknaðinum hækkaðu fyrr í ár 4%, og lønirnar hjá limunum í starvsfelagnum hækka 2,75%. Um lønirnar fara upp við í miðal 3%, so merkir tað, at lønarútreiðslurnar hækka 6 mió. kr.

Rentustuðul og rentugjaldingar byggja eisini á framrokningar í 2022. Bæði skuld og renta eru hækkað í seinastuni, og tí verður neyðugt at seta meira av til rentur.

**Skuld og nettoskuld**
Uppgerðin vísir gongdina í ogn og skuld.

Við ársenda 2021 var netttoskuldin 33,4 mió. kr. omanfyri álíkningina.

| Tkr | R 2015 | R 2016 | R 2017 | R 2017 | R 2018 | R 2019 | R 2020 | R 2021 | M 2022 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Bankaskuld | 157.067 | 147.180 | 144.371 | 144.371 | 142.353 | 157.351 | 157.894 | 311.119 | 351.119 |
| Kreditorar v.m. | 13.705 | 20.280 | 25.409 | 25.409 | 24.129 | 33.469 | 45.398 | 54.975 | 54.975 |
| Bruttoskuld | 170.772 | 167.460 | 169.780 | 169.780 | 166.483 | 190.820 | 203.292 | 366.094 | 406.094 |
| | | | | | | | | | |
| FGJ, skuldarar v.m. | 32.549 | 50.368 | 71.623 | 71.623 | 48.192 | 44.011 | 50.439 | 42.436 | 42.436 |
| Innistanandi | 40.088 | 47.899 | 17.949 | 17.949 | 24.636 | 23.746 | -27.172 | 40.922 | 40.922 |
| Áogn íalt | 72.637 | 98.267 | 89.572 | 89.572 | 72.828 | 67.757 | 23.266 | 83.358 | 83.358 |
| | | | | | | | | | |
| Nettoskuld | 98.135 | 69.193 | 80.208 | 80.208 | 93.654 | 123.062 | 180.026 | 282.736 | 322.736 |
| | | | | | | | | | |
| Ein álíkning 23% | 190.296 | 199.347 | 215.197 | 215.197 | 220.247 | 239.166 | 246.374 | 249.248 | 261.710 |
| Nettoskuld | 98.135 | 69.193 | 80.208 | 80.208 | 93.654 | 123.062 | 180.026 | 282.736 | 322.736 |
| | | | | | | | | | |
| **Nettoskuld í mun til álíkning (tkr)** | **92.161** | **130.154** | **134.989** | **134.989** | **126.592** | **116.104** | **66.348** | **-33.488** | **-61.026** |

Fíggjarætlanin javnvigar við 37,6 mió. kr., og um hetta verður úrslitið, verður bankaskuldin við ársenda omanfyri 350 mió. kr., og nettoskuldin góðar 60 mió. kr. omanfyri eina álíkning.

Orsøkin til hækkandi nettoskuld er, at roknskapirnir 2018 – 2022 vísa 240 mió. kr. í halli.

Verandi uppskot til fíggjarkarm vísir 49,8 mió. kr. í avlopi áðrenn íløgur og avdráttir.

Sum kunnugt hevur Fíggjarmálaráðið sett krav um, at nettoskuldin skal koma undir álíkningina ultimo 2024. Tí kann verða neyðugt at seta pening av til avdráttir.
Restin er so til aðrar raðfestingar – herundir íløgur.

Við hesum verður málið um fíggjarkarm 2023 lagt fyri fíggjarnevnd og býráð til støðutakan.

**Lógargrundarlag:**
Kommunustýrislógin § 39, stk. 1

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Avlopið áðrenn íløgur og avdráttir er 49,8 mió. kr.

**Tilmæli:**
Uppskot til fíggjarkarm fyri 2023, verður hervið lagt fyri fíggjarnevnd og býráð til støðutakan.

**Fíggjarnevndin 27. september 2022:**
Nevndin tekur undir við uppskotinum til fíggjarkarm fyri 2023 og beinir málið í býráðið.

**Klaksvíkar Býráð 29. september 2022:**
Tilmælið frá FíN 27-09-2022 einmælt samtykt.

## FRAMMANFYRI STANDANDI MÁL ERU VIÐGJØRD Á ALMENNUM FUNDI

**87/22**
**22/01688-1 Vinnu- og mentanarstjóri**

**88/22**
**22/01425-1 Lendiskeyp til Fifa-vøll á Syðradali**

**89/22**
**22/01480-4 Møguligt keyp av lendi til parkeringsøki**

**90/22**
**22/00083-11 Søla av lendi**

**91/22**
**22/01473-3 Víðarisøla av lendi**

**92/22**
**22/01126-11 Innlating/víðarisøla av lendi**

**93/22**
**22/01370-15 Víðarisøla av lendi**

Fundur lokin kl. 20.00